# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sorgarleikur í Tibet

Tibet var upprunaliga eitt sjálvstøðugt land, sum var til longu í 10. øld við feudalari samfelagsskipan og teokratiskum stýrislagi. Buddisman í Tibet kom lutvíst úr Kina men mest úr India. Sett varð á stovn eitt sonevnt lamastýri, har buddistiska presta- og munkastættin umframt átrúnaðarligt vald, eisini hevði alt politiskt vald, har tveir høvuðsprestar, Dalai Lama og Panchen Lama býttu valdið sínamillum. Tibet kom tíðliga undir mongolska ávirkan, og í øldir høvdu monogolsku valdsharrarnir eisini stórt vald í Tibet. Tá tjóðskaparliga kollveltingin varð framd í Kina í 1911 lýsti kinesiska stjórnin Tibet sum ein kinverskan landspart, ein yvirlýsing, sum tibetanska lamastýrið ongantíð hevur viðurkent. Eftir at kommunistiski flokkurin í 1949 tók valdið í Kina vóru nógvir kinverskir kommunistar í Tibet, har teir gjørdu so nógv um seg, at tibetanar gjørdu uppreistur og Kina svaraði við at gera hernaðarliga innrás í Tibet. Dalai flýddi til India, haðan hann hevur leitt mótstøðuna móti kinverska yvirvaldinum, meðan Panchen var eftir í Tibet. Panchen varð tikin og sat í kinverskum fongsli til umleið 1980. Kina hevur við harðari hond roynt at noyða tibetanar at góðtaka kinversku útgávuna av kommunismuni. Ávirkanin hjá buddistiska munka- og prestaskipanini hevur støðugt verið undir hørðum trýsti frá kinversku valdsharrunum, meðan alt fleiri kinverjar eru fluttir til Tibet, har teir hava stórt vald.

Í 1959 gjørdu tibetanar uppreistur móti kinverska valdinum í Tibet. Kina svaraði aftur við hernaðarinnrás, sum bardi uppreisturin niður við harðari hond. Síðan eru kinverska valdið og ávirkanin bert vaksin, og kinverska stjórnin metir Tibet sum ein kinverskan landspart. Dalai Lama hevur í útlegd til fánýtis strítt sítt friðarliga stríð fyri tibetanskum tjóðarfrælsi, og einki útlit er til, at stríð hansara fer at eydnast. USA og Bretland, sum longu í 1911 viðurkendu yvirvald Kina yvir Tibet, hava ikki rætt hond frá síðu og sama er um restina av heiminum at siga. Nú er so aftur galið og Kina hevur júst niðurbart fólkslig mótmæli í Tibet við vápnamegi og nógvir tibetanar liggja eftir á. Vesturheimurin harmast, men eingin droymir um at leggja trýst á Kina til tess at fáa hetta stórveldi at virða tey mest grundleggjandi mannarættindi í Tibet. Dalai Lama hevur nú skýrt framferð Kinas sum mentanarmorð. Við hesum sipar hann til, at Kina til tess at kúga tibetanska fólkið týnir tess mál og mentan. Hetta er brot á altjóða sáttmálar. Hetta er yvirgangur. Einki bendir tó á nøkur revsitiltøk móti Kina, og olympisku leikirnir verða sum ætlað. Vesturheimurin hevur ov nógv uppá spæl, og niðurbarda tibetanska fólkið má lata sær lynda við føgrum orðum frá teimum hyklarum, sum manna politisku leiðslurnar fyri vestan.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**Sekstandi partur**

Eg endaði seinast við orðum Jesusar: **Himmal og jørð skulu forganga**. Men nevndi, at vit koma ikki at uppliva tað. Tað kunnu vit siga út frá tí, sum skriftin lærir okkum. Tað er so nógv eftir at ganga út, av tí sum profetarnir hava profetera, sum má henda áðrenn – *Versins endi* - sum vit vanliga kalla tað kemur. Men ikki ber til so bara at leggja høvdið á koddan og sova, hvørki hjá tí trúgvandi ella hjá tí vantrúgvandi. Jesus segði tá ið hann talaði við lærisveinarnar um enda tíðina: **Tað sum eg sigi við tykkum, sigi eg við øll: Vakið!**

Tað stendur eitt øðiligt ragnarrok framman fyri okkum, og eingin veit, hvussu nær tað er. Kanska er tað heilt nær. Dániel profetur m. a. gevur útførligar frágreiðingar um heimsgongdina, hvussu hon skuldi vera, heilt frá tí hann sjálvur livdi og fram til endan, ja heilt inn í ævinleikan. Alt sum hann hevur profeterað, er gingið út, so langt sum vit eru komin, og vit síggja týðuliga tað, sum hann talar um, og sum ikki er gingið út enn, at tað ger seg til at ganga út. Lesur tú Dánielsbók, og setur teg inn í tað, sum hann profeterar, so kanst tú síggja, hvussu meinlíkt tað er tí, sum fer fram í dag í heiminum, tá ið tú lurtar og hyggur eftir tíðindunum.

Hann sigur, at eitt stórt ríki fer at koma, sum er sett saman av tíggju ymiskum maktum (kongum), men split kemur í ríkið, tríggir kongar falla, og so kunnu vit kanska ímynda okkum tað kaos í verður. Europa verður mittpunkt í øllum hesum. Vanliga verður hildið, so vítt sum eg havi skilt, at tað er sjálvur Antikrist, sum stingur seg upp í hasum ríkinum og ger split í.

Lat okkum ikki gera sama feilin, sum hin gudóttandi kongurin Ezekias gjørdi, tá ið hann hoyrdi um dómin, sum skuldi koma yvir judaríki. Hann segði: *Gott........ so verður tíð mín at ganga í friði.* Hatta ljóðar so líkagildugt. Lat okkum ikki siga: Hatta liggur nakað frammi enn, tað verður nokk gott eina tíð enn. Hugsa um børn tíni og barnabørn tíni. Er ikki øll grund fyri okkum trúgvandi at søkja Gud í álvara. Nú eru tveytúsund ár gingin, síðan Jesus áminti øll um at vakja. Er ikki størri grund hjá okkum at søkja Gud, og áminna børnini og tey ungu. Tað er nakað, sum tú, sum trúgandi eigur at leggja áherðslu á. Tann trúgvandi ungdómurin má áminnast, um ikki at líkjast heiminum. Tú trúgvandi ungi tak hetta í ramasta álvara. Far ikki somu leið, sum kanska tann sum tú fylgist við úr skúlanum hvønn dag fer. Hesa áminningina sigi eg, tí eg síggi, hvussu langt okkara fólk er komið út í fráfall frá Gudi, eisini millum tey ungu. *Tann trúgvandi ungdómurin eigur, eins og vit øll, at skilja seg út frá heiminum. Paulus hevur hesa ámminginа: Farið ikki undir ójavnt ok saman við vantrúgvandi!...... hvat samfelag hevur ljós við myrkur! Osf.*

Eg komi eitt sindur nærri inn á Dániel profet seinni. Men fyrst fara vit til Ezekiel. Tað verður næstuferð.

**Framhald**

## Pensjónistar alternativ roynd arbeiðsmegi

SJÁLSTÝRIS-
FLOKKINUM

***Tíðindaskriv***

Arbeiðsmarknaðurin rópar eftir arbeiðsmegi. Men við verandi høgu mótrokning í pensjónini, aftra pensjónistar seg við at fara til arbeiðis, hóast teir hava góða heilsu og kundu hugsað sær at arbeitt

Orsakað av høgu mótrokningini í fólkapensjónini og lága markinum, áðrenn mótroknað verður, er tann parturin av arbeiðsmegini í Føroyum, sum hevur drúgvastu arbeiðsroyndinar, soleiðis fyri, at tað loysir seg ikki nóg væl hjá teimum at fara til arbeiðis.

Støðan er tann, at fleiri fólk, ið hava nátt pensjónsaldur og hava góða heilsu, høvdu vilja farið til arbeiðis, um tað ikki ávirkaði pensjónina. Tí royndi Sjálvstýrisflokkurin at leggja fram uppskot um eina neyðuga broyting í pensjónslógini, sum Landsfelag Pensjónistanna eisini hevur víst á.

Ásannandi, at arbeiðsmegi við stórum royndum hevði verið tøk, um broytingin bleiv framd, vildi Sjálvstýrisflokkurin hava uppskotið fram sum skjótast.

Men tíverri eydnaðist tað ikki at fáa 17 undirskriftir, soleiðis at uppskotið, hóast framløgufreistin var farin, kundi leggjast fram í hesi tingsetuni.

Hetta harmast løgtingsmenninir hjá Sjálvstýrisflokkinum um. Men tó eru vónirnar góðar fyri, at eitt slíkt uppskot verður samtykt, tá tingið kemur saman aftur eftir ólavsøku.

Lógaruppskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum leggur upp til, at í mótrokningini verður 60 % broytt til 30 % og at inntøkumarkið verður hækkað til 120 túsund krónur. Løgtingið hevur áður framt eina tilsvarandi broyting í mótrokningini fyri fyritíðarpensjónistar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.